## Inuittar til Bruxelles

Tá Grønland næsta ár fær formansstarvið í inuittafelagsskapinum ICC, fer felagsskapurin at lata upp skrivstovu í Bruxelles. Formaðurin í grønlendsku deildini av ICC, Aqqaluk Lynge, sigur við KNR, at endamálið við skrivstovuni er at fáa tættari sdamband millum ICC og ES. Aqqaluk Lynge fegnast um, at ES-nevndin hevur biðið ICC um upplýsingar og ráð, nú ES skal leggja sín politikk fyri tað arktiska økið til rættis. Hann heldur tó, at tað er umráðandi hjá ICC at kunna ES um viðurskiftini hjá inuittunum, og tað skal skrivstovan í Bruxelles eisini gera.



## Kunnu gera sum føroyingar

Grønlendingum nýtist ikki at yvirtaka útlendingaøkið fyri at gera málsviðgerðina smidligari. Teir kunnu bara gera sum føroyingar, sigur stjórin í grønlendska arbeiðsgevarafelagnum, Henrik Leth. Við kringvarpið KNR sigur hann, at føroyingar hava fingið eina smidligari skipan, sum ger, at útlendingamál kunnu avgreiðast væl skjótari enn fyrr. Serliga fyritøkur í grønlendsku byggivinnuni hava kært seg um, at tað tekur ov langa tíð at fáa svar frá donsku myndugleikunum.

## Anfinn avsannar skerjing

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, varð í Degi & Viku hósdagin spurdur um skerjingarnar á Fróðskaparsetrinum. Anfinn Kallsberg svaraði soleiðis:

»Eg haldi slett ikki at vit halda aftur í Fróðskaparsetrinum. Tvørturímóti. Eg haldi nemliga tað, at vit hava fulla ferð á, kanska í so nógva ferð á, eftir tí búskaparligu útlitunum, vit hava í løtuni. Ein 26 prosents vøkstur á aktivitetinum har úti, tað er jú eindømi á fíggjarlógini. Desverri er tað nú soleiðs, at hetta verður vent til at tað er ein skerjing á Fróðskaparsetrinum. Tað er tað nú als ikki, tí teir fáa hóast alt næstan 5 milliónir krónur meira til at gera gott við í 2009, í mun til tað teir hava gjørt í 2008. Og tí skilji eg slett ikki henda pástandin um, at verandi virksemi skal skerjast á Fróðskaparsetrinum.«

Tá sjónvarpsverturin í Degi & Viku hjá Kringvarpinum spyr, um tað ikki er rætt, at tað, tey ætla, verður skert, svarar Anfinn Kallsberg soleiðis:

»Okey, tað, sum man ætlaði, ja, men eg gangi út frá at tit í sjónvarpinum eisini hava skert nakað virksemi í mun til tær ætlanir, tit hava. Tað verður ein og hvør stovnur í hesum landi noyddur til í hesum døgum.«

-RN

# Setrið má spara hóa

**Verða tey á Fróðskaparsetrinum biðin um at seta fleiri útbúgvingar á stovn, gera tey tað. Verða tey biðin um ikki at fara út um fíggjarkarmin, gera tey tað. – Men tá man setur so stór ting í verk, so ber tað ikki til, at játtanin ikki fylgir við, sigur Lis Mortensen, forkvinna í stýrinum fyri Fróðskaparsetrið**



*Í stríðnum um játtanina til Fróðskaparsetur Føroya stendur orð móti orði. – Fróðskaparsetrið manglar 5,3 m eini fíggjarlóg í 2009, so hevur onkur eitt stórt problem, tí vit kunnu ongantíð disponera út yvir eitt fíggjarár*

FRÓÐSKAPARSETRIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið tosað um játtanina til Fróðskaparsetur Føroya. Serliga hava nógv sett spurnartekin við, hvussu tað ber til, at Fróðskaparsetrið skal spara, tá tað hevur fingið størri játtan enn árið frammanundan. Hetta kann eisini tykjast løgið. Tí hava vit biðið Lis Mortensen, forkvinnu í stýrinum fyri Fróðskaparsetrið, greiða okkum frá, hvussu hon sær samanhangin í hesum.

### Byrjanin

Tann 12. februar 2008 vóru politikarar og fjølmiðlar bodnir við til kveikingarfund á Fróðskaparsetrinum, har framtíðin hjá Setrinum varð viðgjørd. Nógvar ætlanir vórðu stungnar út í kortið, og táverandi landsstýriskvinna í mentamálum, Kristina Háfoss, tók jaliga undir við ætlanunum.

– Man hevur roynt ta tilgongdina fyrr, at vit skulu siga politikarunum, hvat skal til fyri at seta ætlanirnar í gongd. Men á vári í 2008 er fyrstu ferð at álvari kemur afturum hesi orðini. Hini árini er einki hent, hóast politikararnir lova bæði eitt og annað, greiður Lis Mortensen frá.

Hon greiður víðari frá, at arbeiðið við at seta nakað nýtt í gongd, ikki kann byrja fyrr enn pengarnir eru komir á borðið. Landsstýrið situr tá við eini bráfeingisfíggjarlóg, og ikki fyrr enn 30. mai 2008 verður ein fíggjarlóg samtykt, har tað verða játtaðar 21,4 milliónir til lønir á Fróðskaparsetrinum, í mun til 15,9 milliónir árið undan.

Í játtanini á 21,4 milliónir er tó bert roknað við løn til nýggju starvsfólkini í fimm mánaðir, og tí skal meira játtast til árið eftir, tá løn skal gjaldast alt árið.

### Summarfrítíð forðar arbeiðinum

Tá fíggjarlógin er samtykt, og pengarnir eru komnir á borðið, verður farið undir at seta nýggjar útbúgvingar á stovn.

– Nú má handlast. Árið er hálvrunnið, og lønarkarmurin er hækkaður. Men nú stendur mann við summarferiuni fyri framman. Man hevur fingið stungið út í kortið, at fleiri nýggjar útbúgvingar skulu setast á stovn, og tí má handlast skjótt, vísir Lis Mortensen á.

Í summarferiuni verða trý fyrisitingarfólk sett, sum skulu vera við til at fáa nýggju útbúgvingarnar upp at standa.

– Tað er ótrúligt, at mann í juni fær eina játtan, og longu í september stendur klárur við nýggjum útbúgvingum, sigur Lis Mortensen.

Man hevur tó ikki fingið sett tey sjey vísindafólkini, sum skulu bera hesar nýggju útbúgvingarnar, men mann metir at verandi starvsfólk klára at bera fyrstu fakini, til hini størvini eru sett, og tí tekur mann næmingar inn eftir summarferiuna.

### Lang setunarprosess

Sambært Lis Mortensen er ein orsøk til at bert 17,5 milliónir vórðu nýttar av teimum 21,4 milliónunum, sum vóru játtaðar, at tað tekur langa tíð at finna og seta tey sjey vísindafólkini, sum skulu bera útbúgvingarnar.

– Mann skal út í verðina at leita eftir fólkum, og mann sendir starvslýsingar út í fleiri londum. Av tí sama er setanarfreistin til størvini lang. Síðan koma umsóknirnar inn, og tær skulu viðgerast. Men tað er ikki ein og hvør, ið kann meta um slíkar umsóknir. Mann verður noyddur at finna, hvør hevur førleika at hyggja uppá teirra kvalifikatiónir, og um tær samsvara við okkara tørvir, greiður Lis Mortensen frá.

Nevndir verða settar niður at viðgera umsóknirnar, og ein neyv viðgerð fer